# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Kúhegri er ongantíð staðfestur í Føroyum fyrr, men Olavus Sørensen legði merki til hann á Viðareiði*

# Skuldi til Afrika endaði í Føroyum

**Soleiðis er søgan helst um fyrsta kúhegran, ið nakrantíð er sæddur í Føroyum. Hann var fyrstu ferð sæddur á Viðareiði fyri fýra døgunum síðani og er har enn**

DJÓRALÍV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Silas Olofson*



Kúhegri er fuglur, ið vanliga heldur til í Suðurevropa. Vanliga eru teir í Spania um sumrarnar, og um veturin plaga teir at halda til í Norðurafrika, so fuglurin á Viðareiði er helst farin eitt sindur av leið.

- Tað kemur meira enn so fyri, at fuglar misstaka seg, og flúgva heilt skeivan veg. Tað er stórur møguleiki fyri, at hesin fuglurin er ein av teimum, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Hinvegin er eisini møguleiki fyri, at fuglurin er komin úr USA, tí 27. september vóru tveir fuglar av slagnum sæddir í Íslandi. Dagin eftir var annar burtur, og tað er ein lítil møguleiki fyri, at kúhegrin á Viðareiði er annar av hesum.

- Av tí, at teir eru sæddir í Íslandi tríggjar ferðir fyrr, eri eg ikki kløkkur av, at hesin fuglur á fyrsta sinni verður staðfestur at hava verið í Føroyum, greiðir fuglafrøðingurin frá.

## Funnin á Viðareiði

Fuglurin, ið er vilstur til Føroyar, varð fyrstu ferð sæddur á Viðareiði av Olavusi Sørensen og í fyrramorgunin tók Tóri Simonsen myndir av honum. Eftir at hava kanna myndina, varð staðfest at talan var um kúhegra og ikki silkhegra, sum er meira vanligur um okkara leiðir. Einasti munurin á fuglunum, er, at silkhegrin hevur svart nev, í mun til tað gula hjá kúhegranum.

## Fuglurin er evropiskur

Sambært Jens-Kjeld Jensen er fuglaslagið upprunaliga úr Suðurevropa, men fyri nøkrum árum síðani byrjaðu fuglarnir eisini at nørast í ávísum støðum í Norðurameriku.

Harafturat fortelur ornitologurin í Nólsoy, at fuglaslagið er eitt av teimum, har stovnurin í Heiminum er vaksandi, og økini í Evropa har hann nørist gerst alsamt størri.

Kúhegri hevur fingið navn sítt, tí hann er ofta at finna saman við kríatúrum og serliga kúm.

# Krákur eru flúgvandi rottur

**Tey flestu hava helst lagt til merkis, at sera nógvar krákur hava verið at síggja seinastu tíðina, bæði fram við vegnum og inni í bygdum og býum. Sambært Jens-Kjeld Jensen er tað als ikki løgið**

DJÓRALÍV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Krákan er støðufuglur og hevur verið í Føroyum, so leingi mann veit um. Seinast krákurnar vóru taldar – tað var í 1981 – vóru 1500 pør í Føroyum. Tað, sum undrar, er, at krákan er vorðin so fjølment seinastu tíðina.

Sosialurin hevur spurt seg fyri hjá Jens-Kjeld Jensen, sum er ornitologur.

- Tað eru heilt víst fleiri krákur nú, enn tað hava verið fyrr. Tað eru tvær avgerandi orsøkir til at krákan er vorðin so fjølment. Vetrarnir eru vorðnir nógv mildari enn teir vóru fyrr, og ongin skjýtur krákur í dag. Tað hava ikki verið ordiligir vetrar síðan seinast í sjeytiárunum og tað hevur við sær, at øll spurvasløg, sum krákan eisini hoyrir undir, hava fingið tað betur í Føroyum. Eisini var tað soleiðis fyrr, at um ein kráka varð sædd í eini bygd varð hon skotin, fortelur Jens-Kjeld Jensen.

## Duga væl at umstilla seg

Ein annar stórur fyrimunur hjá krákuni er, at hon dugir so væl at umstilla seg og at fáa tað besta burturúr givnu fyritreytunum.

- Eg fari ikki at samanbera krákur við rottur, men á onkran hátt líkjast tær. Bæði djórasløgini duga at fáa tað mesta burtur úr ongum, og tað er høvuðsorsøkin til, at krákan klárar seg so væl. Fyrr var tað mest kring ruskplássini og úti í haganum, at krákurnar hildu til, men hon er vorðin alsamt tamari, tí fólk ikki skjóta tær longur og tí leita tær sær meiri í bygd øki, har nokk av føði er. tað er helst høvuðsorsøkin til, at stovnurin er vaksin so nógv, greiðir Jens-Kjeld Jensen frá.

## Likkustovnurin minkaður

Nógv kundu hugsa sær, at ein av orsøkunum til, at krákan er so sjónlig í dag, er, at hon hevur tikið yvir frá likkuni og jaga hana burtur frá føðini, men soleiðis er tað ikki.

- Likka og kráka eta ikki tað sama, og tí hava fuglasløgini í veruleikanum onki við hvørt annað at gera. Veruliga orsøkin til, at likkan er fækkað so nógv, er, at flakavirkini eru færri í dag. Samstundis sum tey, ið eru til, hava alsamt minni lívrunnið burturkast kring virkið, sigur ornitologurin í Nólsoy, sum eisini hevur lagt til merkis at likkurnar, ið fyrr fingu tveir ella tríggjar ungar, í dag bara fáa ein. Orsøkin til tess er helst vantandi føði.



*Stóri fyrimunurin hjá krákuni er, at hon dugir so væl at umstilla seg*